Búskapur og vinna:

## Ryanair gott ár

Meðan flestu flogfeløg í heiminum hava lært seg um afturgongd síðani yvirgangsatsóknirnar í USA, hevur írska felagið Ryanair havt munandi framgongd í hesum sama tíðarskeiði.

Í roknskapinum fyri triðja ársfjórðing í 2001, sum Ryanair kunngjørdi í gjár, sæst, at úrslitið fyri teir tríggjar mánaðarnar var 35 prosent betri í fjør enn somu mánaðir í 2000. Samstundis sigur felagið, at ferðafólkatalið er vaksið.

Ryanair er størsta flogfelagið í Evropa, tá talan er um flogferðir av tí bíliga slagnum. Sambært roknskapinum var avlopið triðja ársfjórðing í fjør umleið 200 milliónir krónur, og tað var 35 prosent betri enn sama ársfjórðing árið fyri. Ryanair flýgur m. a. millum Billund og London.

## Bangnir bankar

Bankarnir í Argentina eru ikki serliga fegnir um ta nýggju búskaparloysnina hjá stjórnini.

Tá stjórnin legði loysnina fram sunnudagin, boðaði hon samstundis frá, at bankarnir vóru stongdir mánadagin og í gjár, men at teir skuldu lata upp í dag sum vanligt. Eftir loysnini fáa fólk nú aftur atgongd til sínar pengar í bankunum, og tað hevur fingið bankaleiðslurnar at stúra fyri, at fólk fara at taka allar sínar pengar út.

Tað er tó ikki greitt enn, nær fólk sleppa at taka pengarnar úr bankunum, men í bankunum ivast tey ikki í, at nógv fara at tøma sínar bankabøkur, so skjótt tey fáa møguleikan.

Nýggja loysnin hjá argentinsku stjórnini er ein treyt fyri, at altjóða gjaldoyragrunnurin IMF vil samráðast við stjórnina um landsins ovurhonds stóru skuld.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Iran hevur latið Hizbollah rakettir



*Shimon Peres ávarar Libanon ímóti at lata Hizbollah skjóta rakettir haðani inn í Ísrael*
*Mynd: Reuters*

**Tað heldur í hvussu er ísraelski uttanríkisráðharrin Shimon Peres**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Í samrøðu við blaðið International Herald Tribune sigur Shimon Peres, at Iran hevur latið tí viðgongda Hizbollah-felagsskapinum ikki færri ennj 8000 rakettir av slagnum Katusha. Hetta eru stuttberandi rakettir, sum kunnu raka mál millum 20 og 70 kilometrar burturi.

Peres sigur við blaðið, at rakettirnar eru latnar Hizbollah-deildum í Libanon, haðani tær lættliga kunnu raka mál í Ísrael. Hann dylir heldur ikki fyri, at rakettirnar mugu roknast sum ein hóttan ímóti Ísrael.

- Helda teir í Hizbollah, at teir kunnu skjóta rakettirnar úr Libanon eftir ísraelskum málum, verða vit noyddir at ávara Libanon ímóti tí, sigur ísraelski uttanríkisráðharrin.

Shimon Peres sigur eisini við International Herald Tribune, at Iran hevur fingið Katusha-rakettirnar úr Norðurkorea, og at tey bæði londini samarbeiða um at menna eina langtberandi rakett, sum fer at kunna røkka málum í USA.

Mánadagin skjeyt Hizbollah eftir ísraelskum jagarafloflogførum, sum sambært felagsskapinum vóru komin í libanskt loftrúm.

# Amerikanarar viðganga bumbumistak

**Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, viðgongur nú, at amerikansk flogfør kunnu hava bumbað hermenn, sum bardust saman við amerikanarunum í Afghanistan**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*

Sambært Rumsfeld er talan um ein tilburð í januar mánað nærhendis býnum Kandahar har suðuri í Afghanistan.

Ráðharrin sigur, at amerikansku myndugleikarnir eru farnir at kanna, um teir 15 menninir, sum doyðu bumbuálopinum, vóru viðhaldsmenn hjá stjórnini hjá Hamid Karzai, ella teir vóru úr al-Qaeda ella Taliban.

Amerikanskir fjølmiðlar hava skrivað, at Washington hevur longu biðið afghansku stjórnina um umbering fyri álopið, tí talan var um hermenn, sum stuðlaðu stjórnina, men hesi tíðindini vil Donald Rumsfeld ikki gera viðmerkingar til. Hann sýtti tí eisini fyri at gera viðmerkingar til tíðindini í fjølmiðlunum um, at USA longu skal hava goldið endurgjald fyri mistakið. Kortini viðgekk ráðharrin, at Karzai tók spurningin um endurgjald upp, tá hann herfyri var í Washington.

Afghanskir tænastumenn hava fyrr upplýst, at eingin av teimum 15, sum doyðu í amerikanska loftálopinum, stuðlaði al-Qaeda ella Taliban. Embætismenninir hava tvørturímóti sagt, at menninir høvdu fingið boð um at sita á varðhaldi við eina fyrrverandi vápnagoymslu hjá Taliban.

Úr Norðurlondum:

## Rúsevni á oljupallum

Bert fáar dagar eftir at teir, sum arbeiða á donsku oljupallunum í Norðsjónum, kærdu seg um ta vánaligu trygdina á pallunum, avdúkar danska tollvaldið, at oljumenninir javnan verða tiknir við rúsevnum uppi á sær.

Tollvaldið í Herning sigur, at tollararnir har javnan taka hasj og tablettir av ymsim slagi frá monnum, sum eru á veg út á pallarnar, og í Esbjerg sigur tollvaldið, at tað sama hendir, tá menn koma inn aftur av pallunum. Tollararnir eru tó ongantíð komnir fram á sterk rúsevni so sum heroin og kokain.

Hjá Mærsk Olie & Gas siga teir, at har eru teir vitandi um, at menn hava rúsevni við sær, hóast tað er strangliga bannað at nýta tílík evni á pallunum. Leiðslan undrast mest á, at menn hava rúsevni og rúsdrekka við sær, tá teir koma í land í Esbjerg.

Fakfelagið hjá teimum, sum arbeiða á donsku boripallunum í Norðsjónum, undrast eisini á, at menn bróta reglurnar. Sambært felagnum er hetta fyrstu ferð, at teir hava frætt um, at menn hava rúsandi evni á pallunum.

## Geva upp við internetinum

Fleiri og fleiri norðmenn lata sjálvuppgávuna inn ígjøgnum Internetið. Í fjør nýttu næstan 400.000 einstaklingar tann møguleikan, og tað eina samdøgrið sendu 84.000 norðmenn sjálvuppgávuna inn við telduni.

Talið verður uppaftur størri í ár, tí nú kunnu fyritøkur í Noregi eisini lata sjálvuppgávuna inn ígjøgnum Internetið. Tøknifrøðiliga menningin ger, at fyritøkurnar eisini kunnu lata ársroknskapin og álagdar hagtalssupplýsingar inn tann vegin.



Carita Björklund, Føroya Pedagogfelag:

# Gott foreldratilboð



*Carita Björklund, formaður í Føroya Pedagogfelag, heldur tað vera øgvuliga gott, um foreldur fáa eitt ára barnsburðarfarloyvi í boði*

**–Tað er ótrúliga gott um foreldur fáa eitt ára barnsfarloyvi í boði, sigur Carita Björklund, formaður í Føroya Pedagogfelag**

BARNSBURÐARFARLOYVI
*Ingrid Bjarnastein*

Nú er eitt ára barnsburðarfarloyvi at hóma, og heldur Carita Björklund, formaður í Føroya Pedagogfelag, at tað er ótrúliga gott um foreldur fáa hetta í boði.

– Tá uppskot var frammi um lógarbroyting hesum viðvíkjandi, løgdu vit fram uppskot um, at foreldur skuldu fáa eitt ára barnsburðarfarloyvi í boði, sigur Carita Björklund.

– Tórshavnar Býráð gjørdi tað sama, og tað vísti seg eisini, at hetta loysti seg fíggjarliga, men hetta uppskotið var ikki samtykt. Á pallborðsfundinum hjá Foreldrafelagnum var tað jú ein mamma, sum fortaldi, at hon varð uppsøgd, tí hon ikki fekk nakað ansingarpláss, og hetta er ræðuligt. Í okkara sáttmála kanst tú ikki verða uppsagdur í einum slíkum føri, men foreldur hava ikki fíggjarliga ráð at taka longt farloyvi í eitt hálvt ár, tí tey fáa jú onga løn.

Spurd um hetta kann koma at hava avleiðingar fyri stovnar, um nú øll vøggustovubørn frá 0-1 ár verða tikin vekk, svarar Carita Björklund:

– Vit mugu altso síggja veruleikan í eyguni, sum hann er nú, og tað er, at sum støðan er nú, so eru næstan ongin vøggustovubørn í hasum aldrinum, tí tey sleppa ikki inn. Men tað kann eisini gott verða ein praktiskur trupulleiki, tí um tú hevur vøggustovubørn frá 1-3 ár, so kann tað henda seg, at um árið, so eru tað 15 børn, sum skulu flytast yvir í barnagarð. Um tað so ikki er pláss fyri teimum í barnagarðinum, hvat skal so gerast? Skulu tey uppsigast, ella skulu tey framvegis verða sum barnagarðsbørn í vøggustovu og skulu foreldrini gjalda vøggustovuupphædd ella barnagarðsupphædd. Tað ber væl til at tillaga arbeiðið eftir aldrinum, men tað vísir seg, at praktiski trupulleikin er størri. Tá slíkar broytingar skulu gerast, er tað týdningarmikið at tú eisini hugsar longur fram í tíðina, og ikki bara hugsar um, hvat skal gerast her og nú.

### Hugburðsbroyting

Tosið vendir sær spakuliga inn á høvuðslista og økislistar. Á pallborðsfundinum hjá Foreldrafelagnum varð sagt, at tá høvuðslistin er komin niður á null, so verða økislistarnir tiknir í brúk aftur.

– Høvuðslistin riggar ikki nakað serliga væl, sigur Carita Björklund. – Býtið millum børnini á stovnunum verður heilt skeivt, og hetta er ikki eitt gott pedagogiskt umhvørvi. Tú kanst fáa eitt býtið, har tað til dømis eru 13 dreingir og ein genta, ella umvent, og hetta er synd í børnunum. Foreldrini eru eisini kedd av hesum. Dygdin verður ofta gloymd, tí tað ræður um, at fáa so nógv børn inn sum møguligt.

Nú talan er um eitt ára barnsburðarfarloyvi heldur Carita, at foreldur skulu sjálvi sleppa at avgera, hvør av teimum til dømis tekur tað síðsta hálva árið. Pedagogfelagið roynir at seta barnið í miðdepilin, men tað er ikki altíð so lætt, tá tað eru onnur fyrivarni, ið skulu takast.

– Menn hava sum heild eitt sindur ringt við at taka barnsburðarfarloyvi. Teir tora ikki so væl, og eg veit eisini um okkurt dømi, har arbeiðsgevarin hevur rætt og slætt flent eftir onkrum, ið ætlaði sær at taka barnsburðarfarloyvi.

Tá vit spurdu um talan ikki var um eina hugburðsbroyting, sigur Carita Björklund:

– Jú, sjálvandi. Og tey ungu finna seg heldur ikki í hesum í dag. Lógin sigur, at tey hava rætt til tað, og soleiðis vilja tey eisini hava tað at vera, tíbetur, sigur Carita Björklund at enda.

# 21 menn tikið 10 vikur

Síðani nýggja barsilsskipanin kom at virka í juni í fjør, hava 642 fólk verið í skipanini. Harav vóru 467 kvinnur og 175 menn. Bert 21 av teimum 175 monnunum hava tikið 10 vikur farloyvi, sum teir hava rætt til 14. viku eftir føðing. Hetta sigur so mikið sum tað, at bert góð 3 prosent av pápunum velja, at taka tær 10 vikurnar teir hava rætt til.

**-ib**

## Bíliga á flog til Danmarkar og Skotlands



**Fyri stuttum sendi Maersk Air út tíðindaskriv, at hetta fram til páskir fáast bíligir flogferðaseðlar millum Føroyar og Danmark. Nú hevur Atlantic Airways tikið upp kappingina, har teir somuleiðis hava lækkað sínar prísir – ikkibert til Danmarkar, men eisini til Skotlands**

FLOGFERÐSLA
*Ingrid Bjarnastein*

Fram til páskir bjóðar Atlansflog kundum sínum bíligar ferðaseðlar bæði til Skotlands og Danmarkar. Hetta tíðarskeiðið fáa tey, ið hava hug til tess, møguleika at ogna sær eina vikuskiftisferð til Aberdeen fyri 1095 krónur umframt ferðaavgjøld, og vikuskiftisferðir til Keypmannahavnar fyri 1495 krónur umframt ferðaavgjald.

Tey, ið hava hug at verða í Danmark longur enn eitt vikuskifti, fáa eisini møguleika at ferðast bíliga. Atlantic hevur fingið ein serprís í lag, áljóðandi 1995 krónur.

Einasta krav, ið sett verður til hesi ferða-tilboð er, at tvey ferðast saman, harav kann annað verða eitt barn, og ferðaseðilin skal keypast minst eina viku áðrenn fráferð. Børn fáa eisini avsláttur. Børn upp millum 2 og 11 ár fáa 50% í avsláttri, meðan børn undir 2 ár, gjalda 10% av vanligum ferðaseðlaprísi.

Galdandi fyri allar ferðirnar er, at tær kunnu ikki broytast, og peningurin verður ikki endurgoldin. Ferðaseðlarnir kunnu bíleggjast nú og seinasti heimferðardagur er 25. mars 2002.

Havnar Arbeiðsmannafelag:

## Nevndin afturvald

Havnar Arbeiðsmannafelag hevur havt árliga aðalfundin. Nevndarval var á skránni, og eisini var millum annað roknskapurin lagdur fram. Teir báðir nevndarlimirnir, Hans S.B Joensen og Jan Midjord vórðu báðir afturvaldir.

Formansvalið hjá Arbeiðsmannafelagnum verður um umleið eitt ár, og til ta tíð verður Kar Johansen sitandi í formansessinum.

**-ib**

